Stjórin á Føroya Jarðarráð:

Hetta er misrøkt

– Eg haldi tað er misrøkt, men í praksis fáa vit einki gjørt við málið, sigur Jóannes Dalsgarð, stjóri í Føroyar Jarðará um skilið í Saksunardali, har hagin summastaðni er grópaður upp og liggur í díki og aðrastaðni verður nýttur sum frásetingarpláss til gamlar útlivaðar entrepenørmaskinur

Jóannes Dalsgarð metir málið í Saksunardali so álvarsamt, at talan møguliga átti at verið um at tikið festini frá festarunum

LANDBÚNAÐUR
Jóanes N. Dalsgaard

Økið í Saksunardali, sum talan er um, hoyrir fyri ein part til eitt festi í Hvalvík og fyri ein part til eitt festi í Saksun. Stjórin á Jarðarráðnum sigur, at so sum økið liggur nú, er tað púra óforsvarligt. Hann sigur, at sum stjóri á Jarðarráðnum er hann alt annað enn errin um støðuna.

Jóannes Dalsgarð váttar, at veltistudningur er latin til eitt øki uppá uml. 9000 fermetrar, men at hetta bert er ein lítil partur av tí samlaðu víddini sum »velt« er. Hann sigur, at veltistudningur verður ikki latin, fyrr enn veltingin ber gróður og er sýnað. Tað økið í Saksunardali, sum veltistudningur er latin til, er tí í væl frægari standi enn mestiparturin av lendinum, sigur Jóannes Dalsgarð.

Spurdur um, hví Jarðarráðið, sum evsti ábyrgdarhavari fyri landssjørðini í Føroyum einki ger við málið svarar Jóannes Dalsgarð, at Jarðarráðið kann í praksis einki gera. Hann metir málið so álvarsamt, at talan møguliga átti at verið um at tikið festini frá festarunum. Men Jóannes Dalsgarð sigur, at hetta er so at siga ómøguligt. Hóast Jarðarráðið ikki hevur roynt nakað tílíkt í hesum føri, so vísa royndir, at tað er so gott sum ógjørligt at fáa tikið festi frá einum festara, sigur Jóannes Dalsgarð.

Stjórin á Føroya Jarðarráð sigur, at Jarðarráðið hevur lítlan ella ongan møguleika til yvirhøvur at seta sín vilja ígjøgnum yvir fyri einum festara, sum misrøkir festi. Jóannes Dalsgarð vísir á, at heimildin til at gera inntriv mótvegis festarum, sum misrøkja festi, finst í §12 í lóg um landsjørð. Men tann heimildin er so ógreið, at hon nóg illa kann brúkast, tá talan er um misrøkt av bygningum. Tá talan er um misrøkt av lendi er heimildin púra ónýtilig, staðfestir Jóannes Dalsgarð.

Stjórin á Jarðarráðnum veit at siga, at yvirfriðingarnevndin hevur verið uppi í málinum um støðuna í Saksunardali í 1998, men hann veit ikki, hvørja støðu yvirfriðingarnevndin hevur tikið í málinum.

Pætur skal gita ein sang

Pætur við Keldu fær nú enn ein gyltan møguleika at gera vart við seg í Danmark

Pætur við Keldu skal vera við í væl umtóktu donsku sendirøðini Gita ein sang, eftir at Grand Prix vinnarin gav avboð til sendirøðina

SJÓNVARP
Eyðun Klakstein

Um tvær vikur skal Pætur í upptøkuhølini hjá Danmarks Radio fyri at taka lut í sendirøðini Gita ein sang, sum eisini verður send í føroyskum sjónvarpi.

Væl umtókta danska sendirøðin, har Amin Jensen er vertur, savnar hvørja ferð fýra kendar danskar sangarar at kappast ímóti hvørjum øðrum. Uppgávan er at gita sangir og at syngja teir.

Ætlanin var, at vinnarin í danska Grand Prixnum skuldi verða við í sendingini, sum skal takast upp um tvær vikur. Men Malene W. Mortensen hevur nú givið avboð. Orsøkin er, at Sasha Dupont, sum er annar av klaverspælarunum í sendingini, var partur av dómarapanelinum, sum gav Malenu vánaligt skoðsmál í Grand Prixnum.

Herðaklapp til Pætur

Aftaná Grand Prixið hevur Sasha Dupont eisini umrøtt sangin hjá Malenu sum vánaligan, og hetta hevur fingið danska Grand Prix vinnaran til at geva avboð til sendirøðina hjá DR.

Jørgen de Mylius er redaktiónsleiðari fyri sendingina, og hann sigur seg ongantíð áður hava upplivað slíkt. Men ráðaleysur er hann ikki, tí hann hevur sent boð eftir Pæturi við Keldu.

Hóast skoðbráið hjá Pæturi var stutt, so hevur hann játtað at verið við í sendingini. Hetta er enn ein gyltur møguleiki hjá Pæturi at gera vart við seg í Danmark, og at Pætur yvirhøvur verður biðin um at koma við í sendirøðina, er ein staðfesting av, at fólk longu hava fingið eygað á føroyskan sangaran og tónleikaran.

Longd varðhaldsfongsling

Ein av teimum varðhaldsfongslaðu í stóra narkomálinum á veg í Føroya Rætt. Tveir fingu hósdagin varðhaldsfongslingina longda í fýra vikur

Mynd: Jens Kr. Vang

RÚSEVNI
Stefan í Skorini

Tveir menn, sum hava sitið í varðhaldinum síðan 16. januar, tá teir vórðu tiknir í stóra átakinum móti narkotika, fingu báðir varðhaldsfongslingina longda í fýra vikur afturat.

Menninir, ið eru 27 og 35 ára gamlir, eru báðir skuldsettir eftir revsilógini um at hava smuglað og selt stórar mongdir av rúsandi evnum við vinningi fyri eygað.

Tann 27 ára gamli skal sita avbyrgdur í tvær vikur av teimum fýra, meðan tann 35 ára gamli skal sita avbyrgdur allar fýra vikurnar. Hetta fyri at teir ikki skulu hava møguleika at ávirka kanningararbeiðið hjá løgregluni.

Tveir aðrir menn, sum eisini vórðu handtiknir 16. januar, gingu við til, at varðhaldsfongslingin varð longd uttan rættarfund. Teir koma væntandi fyri rættin í komandi viku, og í fleiri skuldsetingum hava teir játtað seg sekar.

Triggir aðrir menn sita eisini handan rimar, og teir eru skuldsettir fyri smugling og sølu av rúsevnum. Tilsamans sita sostatt sjey persónar varðhaldsfongslaðir í stóra narkomálinum.

Fýra vórðu leyslatnir eftir at hava sitið í varðhaldinum í 24 tímar tann 17. januar. Teir eru tó framvegis skuldsettir, og málini móti teimum verða væntandi tikin upp í næstum.

Skiparin funnin sekur

FISKISKAPUR
Stefan í Skorini

34 ára gamli skiparin á hetlendska trolaranum er dømdur sekur í at hava fiskað á eini stongdari leið vestanfyri Mykines sunnudagin og mánanáttina. Hann er eisini funnin sekur í ikki at hava boðað Fiskiveiðueftirlitinum frá, tá hann kom í føroyskan sjógv.

Brimil tók hetlendska botntrolaran mánamorgunin á eini stongdari leið vestanfyri Mykines. Skiparin á línubátinum Sigmundi var eitt av avgerandi vitnunum. Hann hevði sæð hetlendska trolaran á stongdu, og hann metti, at hesin hevði trolið úti. Henda leiðin er tó opin fyri línu.

Ákærin førdi eisini fram, at fiskurin var nýfiskaður. Prógvið fyri hesum var, at fiskurin enn ikki var stívnaður, tá serfrøðingar kannaðu fiskin umborð. Tí var frágreiðingin hjá skiparanum um, at fiskurin var fingin í ES-sjógvi, ikki trúlig.

Reiðaríið hjá Maranatha skal veita trygd fyri 320.000 krónum, og bótin ljóðar á 250.000 krónur. Harumframt er hald lagt á veiðu og fiskireiðskap.

Skiparin hevði fríggjadagin á middegi enn ikki tikið støðu til, um hann tekur við dóminum.

Bilur útav

FERÐSLUÓHAPP
Stefan í Skorini

Hóskvøldið fór ein persónbilur útav vegnum við undirsjóvartunnilin á Streymoynni. Førarin var einsamallur í bilinum. Bara materiellur skaði stóðst av óhappinum, og førarin slapp snikkaleysur.

Bilurin koyrdi vestureftir og var júst komin út út tunlinum og nærkast undirsjóvartunlinum, tá maðurin í bilinum missir tamarhaldið. Bilurin fer av vegnum og koppar runt.

Óhappið hendi stutt fyri klokkan sjey. Løgreglan sigur, at vegurin verður lagdur um í løtuni, og tí er heldur óslætt á vegnum. Bilurin hevur havt ov nógva ferð, og tí missir førarin tamarhaldið.

Hesin persónbilurin fór útav við undirsjóvartunnilin hóskvøldið. Eingin fólkaskaði stóðst av óhappinum

Mynd: Jens Kr. Vang

Stórur áhugi fyri fjarlestri

Stóru áhugi er fyri at taka útbúgvingina innanfyri leiðslu og fyrisiting, sum er skipað sum fjarlestur. Á myndini greiða umboð fyri Føroya Handilsskúla og BP frá útbúgvingini

Mynd: Jens Kristian Vang

Tað er sera stórur áhugi fyri at fara undir fjarlestur í Føroyum. Heili 120 umsóknir eru komnar til útbúgvingina, ið Føroya Handilsskúli og hægri lærustovnur í Aberdeen bjóða

ÚTBÚGVING
Heri á Rógvi

Umsóknarfreistin til at søkja um upptøku í master útbúgvingini í leiðslu og fyrisiting er runnin. 120 umsøkjarar vóru. Master útbúgvingin í leiðslu og fyrisiting er úrslitið av einum samstarvi millum Robert Gordon University, Føroya Handilsskúla og BP, sum hevur fíggjað út búgvingina. Útbúgvingin er skipað sum fjarlestur, og útbúgvingin er ikki ein fulltíðar útbúgving. Talan er upprunaliga um eina útbúgving, sum er nomera til eitt ár, men hon er longd, soleiðis at hon er betri hóskandi til fjarlestur.

Sjálv útbúgving fer sostatt øll at ganga fyri seg í Føroyum. Útbúgving er sett saman av skeiðum, og við byrjan og endan av hvørjum skeiði, verður skipað fyri tiltakið, har tey lesandi hittast á Føroya Handilsskúla. Á fleiri av hesum døgunum og annars um fjarskifti verður møguligt at samskifta við vegleiðara á Robert Gordon University. Allar prógvtøkur vera eisini á Føroya Handilsskúla.

Elsa Maria Olsen, deildarleiðari fyri Føroya Handilsskúla á Kambsdali, sigur, at hon er stórliga bilsin av, at áhugin hevur verið so stórur.

– Útbúgvingin hóskar sera væl til føroyingar, og hon rakar rættiliga breitt, men eg eri kortini bilsin um, at umsøkjararnir eru so nógvir, sigur Elsa Maria Olsen.

Orsakað av góðu undirtøkuni, so verður tíðarætlanin ikki hildin. Ætlanin var, at umsøkjararnir skuldu fáa boð um upptøkuna 25. februar, men hetta veðrur seinkað eina viku ella so. Allir umsøkjararnir fáa í næstum brævi, har tað verður kunnað um seinkaðu upptøkuni.

Hóast 120 hava søkt, verður ikki pláss fyri fleir enn tjúgu at taka sjálva útbúgvingina.

– Vit lesa allir umsóknirnar ígjøgnum og gera eitt tilmæli, men tað er Robert Gordon University, sum tekur endaliga avgerðina um, hvør verður upptikin, sigur Elsa Maria Olsen.

Teir nógvu umsøkjararnir hava ógvuliga ymiskar bakgrundir. Ein sera stórur partur er eisini væl kvalifiseraður, sigur Elsa Maria.

– Tey, sum ikki sleppa inn hesuferð, verða ikki slept upp á fjall. Vit arbeiða við fleiri útbúgvingarmøguleikan, sum væntandi verða almannakunngjørdir innan langa tíð, sigur Elsa Maria Olsen.

Føroya Handilsskúli hevur sett sær tað mál, at arbeitt verður fram ímóti at bjóða útbúgvingar á bachelor støði innanfyri handil í framtíðini. Hetta seinasta útbúgvingartilboðið er sostatt bæði førleikamenning hjá føroyskum vinnulívið og Handilsskúlanum.